Landsbanki Føroya
GOVERNMENTAL BANK

# UPPRIT

8. APRÍL 2010

# BÚSKAPARVØKSTUR 2011-2015

## Búskaparvøkstur 2011-2015

Vøksturin í føstum prísum í BTÚ hevur tey seinastu 25 árini verið umleið 1% p.a. í miðal. 25-ára miðalvøksturin hevur seinastu 10 árini verið millum 1% og 2% um árið. 25-ára miðaltalið fyri vøkstur er minkandi hesi seinastu árini.

### Metingartíðarskeið

25-ára tíðarskeiðið er ikki tilvildarliga valt, men er tað, tí at stóra kreppan í 1990-árunum er inni í skeiðinum. Í hesum miðaltalinum hava vit megnað at vinna aftur niðurgongdina í kreppuni, og so nakað afturat til reellan vøkstur, kunnu vit velja at siga. Miðaltalið er fallandi, m.a. tí at vit fáa ov lítið av fiski við Føroyar, og m.a. tí at húsarhaldini spara so nógv upp í løtuni. Eisini eru ábendingar um, at ov lítil partur av føroysku íløgunum eru vinnuligar, sum hava produktivitetsvøkstur sum endamál.

### Manglandi botnfiskaveiða

Landingar av toski og hýsu vóru í 2009 ávikavist 9140 tons og 4510 tons. M.a. hetta kann síggjast í datagrunninum hjá Hagstovuni[1]. Fyri tíðarskeiðið 1995-2010 hava landingarnar av toski verið í miðal 19.500 tons um árið og prísurin í miðal 20,22 kr/kg, meðan landingarnar av hýsu hava verið í miðal 12.700 tons um árið og prísurin í miðal 10.35 kr/kg. Langtíðarveiðan av toski verður mett at kunna vera meira enn 25.000 tons[2] um árið, og av hýsu 15.000 tons[3].

Her verður mett, at toska- og hýsuveiðan fer at vaksa eftir 5 árum til tað, sum miðalveiðan hevur verið 1995-2010, men at veiðan ikki kemur upp á langtíðarpotentialið av tí, at vit brúka ov nógvan kapasitet til veiðuna. Við miðal landingarprísinumum, sum hevur verið hesi 15 árini síðan 1995, og einum ískoyti til virðið fyri løn í virking á landi, svarar tílíkur vøkstur til umleið 450 mió. kr. um árið í bruttotjóðarúrtøkuni. Hetta fæst burtur úr eini greining av tølunum. Eisini fæst burtur úr greiningini, at vøksturin í BTÚ í føstum prísum kann økjast við 0,6%-stigum um árið, um veiðuvirðið veksur við einum fimtingi um árið í 5 ár.

Eftir fimta árið fellur vøksturin aftur við 0,6%-stigum, uttan so at kapasiteturin verður minkaður. Verður veiðukapasiteturin minkaður munandi, kann veiðan koma uppá potentiellu langtíðarveiðuna. Virðið á hesum kann væl gerast 300-400 mió. kr. í størri BTÚ um árið, sum stavar frá størri veiðuvirði og lægri rakstrarkostnaði, sum kann svara til eini 0,4%-stig í árligum vøkstri í BTÚ.

### Nýtslan hjá húsarhaldum

Húsarhaldsnýtslan hevur sambært tjóðarroknskapinum verið millum 85% og 101% av tøku húsarhaldsinntøkuni millum 1998 og 2006, fyri tað mesta omanfyri 90% og við ábending um vøkstur. Serstakliga vaks hon nógv, tá tað var lætt læna 2005-2007. Landsbankin hevur m.a. við støði í gongdini í lønargjaldingum og mvg-inntøkum landskassans mett, at húsarhaldini hava økt uppsparingina og harvið minkað nýtsluna til umleið 88% av tøku húsarhaldsinntøkuni.

Tað er neyvan sannlíkt, at húsarhaldini velja at hava so lítla nýtslu í longdini. Mett verður, at húsarhaldini eftir 5 árum økja nýtsluna til 95% av tøku húsarhaldsinntøkuni, sum er umleið ta leguna, sum nýtslan hevði, áðrenn stóra lántøkan byrjaði í 2005. Mett verður, at nýtslan veksur við einum fimtingi av 480 mió. kr. um árið í 5 ár. Sambært búskaparmyndli landsbankans eru 26% av nýtsluni innflutningur, óbeinleiðis sum partur av føroyskari framleiðslu ella beinleiðis. Hetta merkir,

---

[1] Miðal avreiðingarprísir og landað nøgd fyri ávís fiskasløg, skift á mánaðir (1995-2010), http://www.hagstova.fo.

[2] ICES NWWG Report 2007, p. 26, “The catch has normally fluctuated between 20 and 40 kt.”

[3] ICES NWWG Report 2007, p. 84, “Nominal landings ... about 17000t which is around the average since 1957”

at BTÚ verður 355 mió. kr. størri enn annars eftir 5 árum. Greiningin vísir, at BTÚ í føstum prísum kann vaksa 0,4%-stig meira hesi 5 árini av hesum, men síðan lækkar aftur 0,4%-stig.

## Niðurstøða

Samanumtikið eru útlit til, at árligi miðalvøksturin 2011-2015 kann fara at vera 2% í føstum prísum, har 1%-stig er tann vøksturin, vit hava sæð frammanundan, 0,6%-stig kunnu stava frá betri heimaveiðu og eini ávísari normalisering av fiskaprísum, og 0,4%-stig kunnu stava frá, at húsarhaldini fáa mót til at økja nýtsluna.

Skal vøksturin ikki falla aftur niður á umleið 1% í føstum prísum aftaná 2015, verður neyðugt at fremja átøk, sum økja produktivitetin í búskapinum.

Roknað verður við árligari inflasjón uppá 2%. Sostatt kann BTÚ fara at vaksa 4% í miðal í leypandi prísum.

Landsbanki Føroya

GOVERNMENTAL BANK

Landsbanki Føroya | Yviri við Strond 15 | P.O.Box 229 | FO-110 Tórshavn | Faroe Islands | Tel. +298 350300 | Fax +298 350301
www.landsbankin.fo | landsbankin@landsbankin.fo | VTal: 382809